Dimmalætting

7 kr.

116. árgangur • NR. 126 • Týsdagur 2. november 1993 • Tlf. 11212

Ungir føroyingar hava verjuskyldu

Í hesum døgum er hópflyting úr Føroyum til Danmarkar. Til ber nú at flyta beinleiðis yvir í danska A-kassan. Men ert tú mannfólk undir tredivu og ikki í útbúgvingarørindum, verður tú eisini skrásettur hjá hervaldinum.

DIA MIDJORD

Tað eru nógvir føroyingar, ið heldur vilja ganga arbeiðsleysir í Danmark enn í Føroyum. Hetta er staðfest seinastu tíðina, nú fleiri føroyingar hava stungið í klæðsekkin og eru rímdir úr landinum.

Kortini eigur ein at verða mintur á, at tað eisini eru ymiskar treytir, ið danir seta sínum borgarum. Ein teirra er verjuskyldan, ið øll mannfólkini undir tredivu ára aldur hava.

Flytir ein føroyingur til Danmarkar, skal tað verða í útbúgvingarørindum ella bert eitt ávíst tíðarskeið, skal hesin sleppa undan verjuskylduni. Er talan um ein føroying undir tredivu ára aldur, ið bert flytir úr føroysku í donsku skipanina, verður hesin innkallaður beinanvegin hann er skrásettur búgvandi í Danmark.

Hetta kann so í mongum førum vera eggjandi fyri ungar arbeiðsleysar føroyingar, tí so sleppa teir í øllum førum at gera nakað til nyttu og merkja at onkur hevur brúk fyri teimum. Hinvegin kann tað eisini verða óheppið fyri onkran, ið bert vildi sleppa verða arbeiðsleysur á flatlondum.

Nú liggur avgerðin í Fíggjareftirlitinum

Gjaldssteðgurin hjá Fossbankanum varð í gjár longdur í eina viku. Bretska fyritøkan Spencer Hammond er til reiðar at bjarga bankanum – so er tað bara upp til Fíggjareftirlitið, um teir góðkenna bretsku fyritøkuna.

GEORG L. PETERSEN

Um Fossbankin verður bjargaður, heldur hann ikki fram sum ein føroyskur banki, men bretskur.

Ætlanir hava verið at konvertera, ella umgera innistandandi, til partapening í eini endurreisingarætlan í Fossbankanum. Eisini varð ætlanin at fáa onnur føroysk áhugamál at seta pening í bankan. Men hesar ætlanir eru sleptar. Hetta varð kunngjørt í skiftirættinum í gjár.

Ein av orsøkunum til hetta er støðan, landsstýrið tók í seinastu viku. Landsstýrið, sum eigur 27 milliónir krónur í bankanum, ynskti ikki at umgera peningin til partapening.

Av tí at málið hevur so stóran áhuga, varð avgjørt at halda skiftisamlingina í Havnar Klubba.

100 milliónir krónur

Nakað av fólki var komið saman. Millum tey sum vóru til staðar, var eisini maðurin, ið møguliga kann savna restirnar av Fossbankanum, og fáa hann aftur á beinini – Bill Stangoe, frá bretsku stórfyritøkuni Spencer Hammond Associates (International).

Hann hevur vegna Spencer Hammond Associates (International), bjóðað sær at sett 100 milliónir krónur í bankan, so hann harvið lykur allar treytir, ið verða settar bankum.

Eginognin í Fossbankanum gjørdist negativ við 28 milliónum krónum, tá Fíggjareftirlitið 10. oktober kravdi, at 80 milliónir krónur skuldu setast av aftur at tí, sum longu var avsett móti tapi.

Seinasti útvegur

Lógin krevur, at bankin minst hevur 40 milliónir krónur eru í eginogn. Verða tær 100 milliónirnar settar í bankan, verður eginognin sostatt positiv við yvir 70 milliónum krónum.

Hetta er seinasti útvegur. Um Fíggjareftirlitið ikki góðkennur bretsku stórfyritøkuna, fer bankin á húsagang.

Og tíðin hjá Helga Fossadal sum bankastjóri tykist vera úti. Eisini hon avgjørd av danska eftirlitinum.

Bankaeftirlitið hevur kravt broytingar í leiðsluni. So eg haldi neyvan fram, sigur Helgi Fossadal.

Týsmorgunin klokkan 9.30 gongur longdi gjaldssteðgurin út.

Í gjár uttanfyri Havnar Klubba. Tað var helst fyri seinastu ferð, at Helgi Fossadal tosaði við sjónvarpið sum bankastjóri

Níggju sjólótust tá Bordanes sakk

Neyvan verða fleiri funnir á lívi eftir syrgiligu skipsvanlukkuna í Norra seint hóskvøldið, tá línuskipið Bordanes gekk burtur. Bert tríggir av teimum 12 sluppu við lívinum, og í dag verður minningarguðstænasta hildin í Ålesund.

DIA MIDJORD

Hósdagurin í farnu gjørdist ein dapur dagur hjá mangum 100 sjómíl í ein landsnyrðing úr Hammerfest á Nordkappbankanum, hendi ein syrgilig skipsvanlukka, ið eftir øllum at døma hevur kravt 9 mannalív. Línuskipið Bordanes fekk ein sjógv, og áðrenn manningin fekk stundir at umrøða seg, gekk skipið burtur.

Ein varð funnin lívleysur beinanvegin, tá leitingarar beiði varð sett í verk. Seinni vóru tríggir av manningini funnir á einum bjargingarflaka. Hetta vóru skiparin og føroyingarnir, Johannes Johannesen og Martin Olsen.

Hóast leitað varð til seint leygardagin, so vórðu ikki fleiri av teimum 8 saknaðu funnir. Føroyingurin Jan Poulsen er ein teirra. Roknað verður ikki við, at finna fleiri á lívi.

Minningarguðstænasta verður hildin í dag í Ålesund fyri teimum 9 monnunum, ið sjólótust við línuskipinum Bordanes.

Ráðstevna um olju og undirgrund

Í døgunum 12. og 13. november skipar landsstýrið fyri ráðstevnu í Lærarskúlahøllini um olju og undirgrund.

Ráðstevnan er ætlað politikarum, men umboð fyri feløg og stovnar fáa eisini høvi at luttaka. Hildnir verða fyrilestrar, ið leggja upp til spurningar. Endað verður við orðaskifti um, hvørjir møguleikar eru fyri føroyingum í oljuvinnuni.

Fyrra dagin verða hildnir fyrilestrar um olju og gass sum liður í orkuveitingini – og oljuídnaður sum vinnugrein á altjóða og heimligum støði verða lýst, síðan verður tað føroyska økið viðgjørt.

Greitt verður frá landgrunsøkinum og fiskiøkinum, »hvíta« økinum, tí »gráa« økinum, og hvørjar kanningar kunnu gerast hvar. Tey jarðfrøðiligu viðurskiftini og fortreytirnar fyri at olja finst, tey ymisku skeiðini í eini oljuverkætlan og møguligt árin á umhvørvið verða viðgjørd. Seinna dagin verður greitt frá, hvussu oljuídnaðurin virkar. Bahrain verður viðgjørt sum dømi um eitt lítið land við oljuídnaði. Síðan verður tørvurin á lógum, reglugerðum og umsiting viðgjørdur, og síðsti fyrilesturin er um gongdina í norsku oljuumsitingini, har nomið verður við fyrimunir og vansar við almennari stýring og hvat er neyðugt at stýra.



Sverre Dan Joensen kemur higar úr Bahrain at halda fyrilestur

Fyrilestrarhaldarar koma ymsastaðni frá. Umframt limir í Oljuráðleggingarnevndini kann nevnast, at Sverre Dan Joensen kemur líka úr Bahrain til Føroya at halda fyrilestur. Hann er hálvur føroyingur og arbeiðir í oljuídnaðinum í Bahrain. Hann hevur í Dimmalætting og Sosialinum hava greinir um føroyska oljuvinnu – borin saman við altjóða royndir.

Marita Petersen, løgmaður, setir ráðstevnuna. *pdd*

Esbern og Sámal dystast í Landsrættinum hósdagin

Herfyri dømdi Føroya Rættur Sámal Bláhamar at rinda Postverkinum slaka millión krónur fyri pening, sum Føroya Rættur metti Postverkið hava lagt út fyri Sámal Bláhamar. Bláhamar gjørdi av at kæra dómin fyri Eystara Landsrætt. Samstundis hevur Sámal Bláhamar kært postverksstjóran fyri landsgrannskoðaranum.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Málið millum Sámal Bláhamar og P/F Super Dekk Service øðrumegin og postverksstjóran hinumegin, verður mett sum rættiliga prinsippielt og áhugavert.

Málið snýr seg um ein bygning, ið Sámal Bláhamar hevði ætlanir at reisa í Havn. Bygningurin skuldi nýtast til ferðavinnuna, sum Sámal hevur verið ein partur av seinastu tíggju árini. Ætlanin var at hava ferðaskrivstovu og gistingarhús/vallaraheim í húsinum.

Men Sámal Bláhamar var vitandi um, at Postverkið søknaðist eftir hølum, og tí setti hann seg í samband við Esbern Midjord, aðalstjóra á Postverkinum. Skjótt avtalaðu teir báðir, at Postverkið skuldi leiga ein part av bygninginum.

Sjálvan bygningin skuldi Sámal Bláhamar fáa úr Danmark. Sámal rindaði teimum, ið seldu bygningin, 117.000 krónur sum eitt slag av tryggingarfæ (frammanundangjald). Men tá restin skuldi rindast, megnaði hann ikki meira.

Postverkið leggur út

Tá trupulleikarnir hjá Sámali Bláhamar at rinda bygningin sóu dagsins ljós, tók Postverkið um endan. Og tað verður tikið sum tekin um, at Postverkið var rættiliga áhugað at fáa bygningin reistan.

Gongdin er nú í stuttum tann, at Postverkið ferð eftir ferð rindar hundraðtúsundvís krónur til felagið, ið skuldi selja Bláhamar bygningin. Endin er, at Postverkið hevur rindað slaka millión krónur.

Men bráddliga boðar Esbern Midjord Sámali Bláhamar frá, at Postverkið ikki ynskir at vera við í ætlanunum meira. Samstundis fær Sámal Bláhamar kontoavrit av eini girokonto, har hann stendur at skylda nevndu sløku milliónina.

Men hetta finnur Sámal Bláhamar seg ikki í. Hann ger beinanvegin greitt, at hann als onki veit um girokontoina. Hann hevur ikki biðið Esbern Midjord stovnað, og uppáttur minni skuldskrivað, eina konto fyri slaka millión krónur í sínum navni. I Føroya Rætti kom heldur onki skrivligt fram, ið vísti, at Sámal Bláhamar hevði biðið postverksstjóran stovnað og skuldseta eina girokonto.

Kærdi til landsgrannskoðaran

At postverksstjórin av sínum eintingum hevur stovnað og skuldsett eina girokonto fyri slaka millión krónur, hava Sámal Bláhamar og saksøkjari hansara, Bjørn á Heygum, mett sera álvarsamt. Tí gjørdu teir av at kæra framferðarhátt postverksstjórans fyri Grannskoðanardeild landskassans. Hetta gjørdu teir eftir dómsúrskurðin í Føroya Rætti.

Landsgrannskoðarin, Leivur Harryson, váttar fyri *Dimmalætting*, at tey hava fingið kæruna um postverksstjóran. Men Grannskoðanardeild landskassans kann í veruleikanum onki gera við málið.

– Tað eru fleiri almennir stovnar, ið vit ikki grannskoða, og sum vit, sambært galdandi lógum, ikki eiga at grannskoða. Postverkið er ein slíkur stovnur. Tí hava vit sent málið víðari til løgtingsgrannskoðararnar, sigur Leivur Harryson, landsgrannskoðari.

Vit royndu at fáa eina viðmerking frá Sverra Midjord, løgtingsgrannskoðara, í gjár, men tað eydnaðist ikki. Men *Dimmalætting* skilir, at løgtingsgrannskoðararnir ikki vilja gera nakað við málið, fyrr enn sakin millum Bláhamar og Postverkið er avgjørd í Eystara landsrætti.

Seint hósdagin verður málið helst tikið upp til dóms.

Prentlutir
fyri avtalaðan prís
til ásetta tíð!
✔ Skjót avgreiðsla
✔ Kappingarføran prís

Dimmalætting
Tlf. 11212

SMS 16 ÁR
Vit halda føðingardag við hópin av góðum tilboðum og nógvum spennandi tiltøkum
Sí lýsingar okkara inni í blaðnum

Í BLAÐNUM Í DAG

Ein »hani« á Húsarhaldsskúlanum

Næmingatalið í ár á heystskeiðnum hjá Klaksvíkar Húsarhaldsskúla er 21. Tey eru øll sera glað fyri skúlan og fyri fyrstu ferð í søguni er ein einsamallur hani millum allar hønurnar.

Rúsdrekkasølan í lítlari minking

Í dag er eitt ár síðani Einkarsølan landsins (Rúsan) læt upp. Dagligi leiðarin, Dagmar Joensen, letur væl at fyrsta árinum. Tó at rúsdrekkanýtslan hevur verið í ávísari minking seinnu árini, hevur Einkarsølan yvirskot.

Konsertlívið í blóma

Mikukvøldið og hóskvøldið hava Sámal Petersen og Jóhannes Andreassen konsertir ávíkavist í Norðurlandahúsinum í Havn og Býraðshøllini í Klaksvík. Næsta leygarkvøld verður Gospel-konsert í Skopun til frama fyri gøtubørnini á Philippinunum.

Foreldur á Argjum í Tinganesi

Eftir middagsleitið í gjár handaðu foreldur at børnum, ið hava verið kommunalt ansað á Argjum, eitt skriv til landsstýrismannin við kommunumálum, Signar á Brúnni.

Politisk tiltøk frá samgonguni fara skeivan vegin

Hetta sigur fakfelagsformaður í viðmerking inni í blaðnum í dag. Høgni Højgaard, formaður í Føroya Handverkarafelag, hevur ikki nógv gott at bera sitandi samgongu.



Sjómansskúlin hundrað ár

1. november 1893 byrjaðu Jens Mohr og Jens í Dali skiparaskúla í Havn. Jens Mohr hevði skúla til 1906, uml. 60 skiparanæmingar fingu prógv frá hesum skúla. Hin skúlin helt fram - seinni við Jens Paula í Dali sum lærara og fyristøðumanni. Hann er støði undir Føroya Sjómansskúla.